Meginfelag Áhugaleikara Føroya
Undir Pisuvarða 2 * FO-100 Tórshavn * Tel. 285624 * E-mail: maf@maf.fo * www.maf.fo

# At skriva til pall

## 23. – 25. apríl 2021 á Gjáargarði



Set kross í kalendararn **23. – 25. apríl 2021** og tekna teg til skriviskeiðið **At skriva til pall**, ið MáF skipar fyri á Føroya Fólkaháskúla. Tríggir spennandi dagar har tú hevur møguleika at menna tíni hugskot til søgu á palli í einum kreativum og spennandi umhvørvi.

Undirvísari verður **Gunvør Reynberg,** ið er útbúgvin sjónleikari á Statens Teaterskole og hevur arbeitt sum sjónleikari á eitt nú Aalborg Teater og Det Kongelige Teater og eisini hevur spælt í fleiri kabarettum. Umframt at arbeiða sum sjónleikari og leikstjóri, hevur Gunvør í fleiri ár arbeitt sum tekstahøvundur, har hon hevur skrivað tekstir til m.a. fleiri kabarettir og poppsangir, og eisini hevur hon skrivað fleiri barnabøkur og somuleiðis umskrivað barnabøkur til eitt nú familjusangleikir.

Hevur tú eina góða søgu, ið tú kundi hugsað tær at sett á pall? Manglar tær íblástur í at koma í gongd við at skriva? So er hetta skeiðið nakað fyri teg. Á skeiðnum fært tú við samrøðum og skrivivenjingum nøkur amboð, soleiðis at eitt gott hugskot ikki endar í skuffuni ella ruskspannuni. Tú lærir, hvussu tú skrivar eitt gott hugskot um til sjónleik, hvussu tú byggir eina søgu upp, soleiðis at áskoðarin ikki missir áhugan í søgugongdini, hvussu tú skrivar eina góða samrøðu, og hvussu tú skapar ein ella fleiri trúligar og áhugaverdugar persónar og mangt annað.

Undirvísingin byrjar **fríggjakvøld og annars leygardag til sunnudag frá kl. 09.00 – 17.30** við matarsteðgi á middegi umframt okkurt leskandi/etandi í smáum støðgum fyrra- og seinnapart. ***Gevi gætur, at møtt verður fríggjakvøldið 23. apríl til ábit og undirvísing.***

Prísurin fyri alt skeiðið íroknað uppihald og mat á háskúlanum er **kr. 1.500 / 1.900**. Avmarkað pláss.

Áhugaði kunnu fáa meiri kunning og tekna seg elektroniskt inni á heimasíðuni hjá MáF www.maf.fo ella við at fara inn á tiltakið ***At skriva til pall*** á Facebook. Skráseting er fyrst galdandi, tá ið goldið er á konto í **Eik Banka: 9181-185 132 4 í seinasta lagi 1. februar 2021**.